


# Western standa fyri verkætlan í Barentshavinum

**Jan Müller**

14.03.2014 - 20:58

Oljan.fo

Herfyri frættist at ikki færri enn 33 oljufeløg eru farin saman um eina seismikkverkætlan í Barentshavinum við Statoil sum fyristøðufelag. Við er eisini Faroe Petroleum, sum hevur røtur í Føroyum.

Nú er so greitt, at tað verða tey bæði royndu seismikkfeløgini, WesternGeco og PGS, sum skulu standa fyri umfevnandi kanningini, ið skal gera oljufeløg betri før fyri at finna olju og gass í hesum risastóra havøkinum fyri norðan.

Hetta eru seismikkfeløg, sum eisini eru kend frá kanningum á Føroyaleiðini. Í 1994 fekk Western til uppgávu at skjóta seismikk á føroyska landgrunninum og var hetta grundarlagið undir táverandi fyrireikingunum til leiting á føroyska landgrunninum.

Økið, sum tey bæði seismikkfeløgini skulu dekka, er uppá 13.700 ferkilometrar.

Innsavningin av seismiskum data byrjar í apríl og fer fram annan og triðja ársfjórðing. Tulkingin av data skal vera liðug á sumri 2015. Tilfarið skulu feløgini so brúka í sambandi við komandi leitiumfar á landgrunninum.

Hetta er ein nýggjur háttur at arbeiða uppá innan oljuvinnuna. Tað verður nógv bíligari og roknað verður eisini við at fáa nógv hægri góðsku, nú serfrøðingar frá øllum teimum 33 oljufeløgunum kunnu arbeiða saman um tilfarið og tulkingina av tí. Hetta gevur tí fyrimunir á fleiri økjum fyri oljufeløgini og fáa feløgini á henda hátt til vega data av betri góðsku og við hægri upploysn